LANDSGRANNSKOÐANIN

# Kunningarskriv

# um

# grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

**Mai 2007**

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 postur@lg.fo
www.LG.fo

# Innihaldsyvirlit

1 LÓGARREGLUR 3

2 LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR 3

3 LANDSGRANNSKOÐARIN 3

4 ROKNSKAPARGRANNSKOÐANIN 3

4.1 LANDSGRANNSKOÐANIN 3
4.2 PRIVATIR GRANNSKOÐARAR 3

5 RINGRÁSIN FRÁ FÍGGJARLÓG TIL LANDSROKNSKAP OG GRANNSKOÐAN 4

6 UPPGÁVUR HJÁ ROKNSKAPARGRANNSKOÐANINI 4

6.1 FÍGGJARGRANNSKOÐAN 4
6.2 YVIRORDNAÐ UM FÍGGJARGRANNSKOÐAN 5
6.3 ALMENT UM INNANEFTIRLIT 5
6.4 SAMSKIFTI VIÐ LEIÐSLUNA UM VANDAN FYRI SVIKI 6
6.5 FYRISITINGARGRANNSKOÐAN 7

7 FRÁGREIÐINGAR 7

7.1 FRÁGREIÐINGAR TIL LØGTINGSGRANNSKOÐARARNAR 7
7.2 FRÁGREIÐINGAR TIL STOVNSLEIÐARAR OG AVVARÐANDI LANDSSTÝRISMANNIN 7
7.3 FRÁGREIÐINGAR TIL ALMENNINGIN 8

# Grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

## 1 Lógarreglur

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

## 2 Løgtingsgrannskoðararnir

Løgtingsgrannskoðararnir eru 4 løgtingsmenn, valdir av Løgtinginum. Løgtingsgrannskoðarnir skulu fara ígjøgnum landsroknskapin og aðrar roknskapir hjá landsstovnum o.t., og skulu ansa eftir, at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg. Harafturat skulu teir ansa eftir, at tað er hóskandi arborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja uppskot til samtyktar fyri tingið um at góðkenna roknskapirnar, saman við teirra viðmerkingum.

## 3 Landsgrannskoðarin

Formansskapur Løgtingsins tilnevnir ein landsgrannskoðara at standa fyri roknskapargrannskoðanini, og landsgrannskoðarin er skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum. Landsgrannskoðarin er óheftur í virki sínum, og hann setir sjálvur síni starvsfólk.

## 4 Roknskapargrannskoðanin

Arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum byggir á frágreiðingar frá roknskapargrannskoðanini. Roknskapargrannskoðanin verður útint av:

- Landsgrannskoðanini og
- løggildum og skrásettum grannskoðarum.

### 4.1 <u>Landsgrannskoðanin</u>

Landsgrannskoðanin skal grannskoða allar roknskapir, um ikki annað er ásett í lóg, kunngerð e.ø. Flestu roknskapir hjá stovnum og grunnum, sum landið eigur, eru við í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin grannskoðar flestu teirra. Harafturat kann Landsgrannskoðanin krevja at fáa til kanningar aðrar roknskapir, t.d. hjá stovnum, feløgum og grunnum.

### 4.2 <u>Privatir grannskoðarar</u>

Í áratíggjur hava privatir grannskoðarar havt ábyrgd av roknskapargrannskoðanini av einum parti av almenna virkseminum í Føroyum. Hjá nøkrum landsstovnum v.m. er tað við lóg, kunngerð, viðtøkum e.l. ásett, at grannskoðanin skal verða útinnt av løggildum ella skrásettum grannskoðara, og í øðrum førum er talan um at grannskoðanin er sambært avtalu ella siðvenju.

Harafturat grannskoða privatir grannskoðarar grunnar og sjálvsognarstovnar o.l., hvørs rakstrarætlan er tikin við á fíggjarlógina.

Løggildir og skrásettir grannskoðarar grannskoða í dag uml. 60 roknskapir.

# 5 Ringrásin frá fíggjarlóg til landsroknskap og grannskoðan

Samskiftið millum Føroya løgting, løgtingsgrannskoðararnir, Landsgrannskoðanina og privatu grannskoðararnar kann lýsast soleiðis:




Myndir lýsir:

- Løgtingið
  - velur løgmann, sum setir landsstýrismenn at umsita málsøkir
  - velur formansskap Løgtingsins, sum tilnevnir ein landsgrannskoðara
  - velur 4 løgtingsgrannskoðarar
- Løgtingið samtykkir fíggjarlógina
- Landsstýrismenn umsita málsøkini á fíggjarlógini
- Landsroknskapurin fyri undanfarna fíggjarár verður lagdur fram
- Landsgrannskoðanin og privatir grannskoðarir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar
- Løgtingsgrannskoðararnir orða uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin
- Løgtingið góðkennir landsroknskapin

# 6 Uppgávur hjá roknskapargrannskoðanini

Tað áliggur roknskapargrannskoðanini at útinna bæði fíggjar- og fyrisitingargrannskoðan.

## 6.1 Fíggjargrannskoðan

Sambært § 7, stk. 2, og § 4, stk. 2 og 3, 1. pkt., fevnur fíggjargrannskoðan um eftirlit við:

*at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg

*at* roknskapurin er rættur, og at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar

*at* tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

## 6.2 Yvirordnað um fíggjargrannskoðan

Grannskoðanin verður í størst møguligan mun framd samsvarandi grannskoðanarstandardum hjá IFAC[1], serliga ISA[2] nr. 315, nr. 330 og nr. 500.

Grannskoðarin skal seta seg so mikið væl inn í viðurskiftini á stovninum, íroknað innaneftirlitið, at hann dugir:

- at meta um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri seg av mistøkum ella sviki,
- at leggja til rættis og fremja framhaldandi grannskoðan

Harafturat skal grannskoðanin fara fram sambært ISA 240, grannskoðanarstandardur um "Skylduna hjá grannskoðaranum at umhugsa svik í sambandi við grannskoðan av roknskapum", sum leggur upp til at umrøða vandan fyri sviki við leiðsluna.

## 6.3 Alment um innaneftirlit

Sambært pkt. 42 í ISA 315[3] er "innaneftirlit" tiltøk, sum ovasta leiðslan, dagliga leiðslan og onnur skipa og seta í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at virkið røkkur sínum málum (málini kunnu verða bólkað í 3 høvuðsbólkar):

- At roknskapurin er rættur og álítandi
- At raksturin er effektivur
- At lógir verða hildnar

Innaneftirlitið er tí skipað og sett í verk fyri at byrgja upp fyri teimum vandum, ið kunnu forða fyri, at stovnurin røkkur sínum málum, herímillum at roknskapurin er rættur og álítandi.

Sambært pkt. 43 í ISA 315 fevnir innaneftirlitið um hesi lið:

a. Eftirlitsumhvørvi (hugburður hjá leiðsluni til innaneftirlit)
b. Váðameting (at meta um og byrgja upp fyri skeivum upplýsingum/vandum)
c. Upplýsingaskipan til roknskaparframløgu og annað samskifti
d. Eftirlitsvirksemi (skal tryggja, at tiltøk hjá leiðsluni verða framd í verki)
e. Umsjón (hjá leiðsluni við, um innaneftirlitið virkar sum ætlað)

Innaneftirlitið er amboðið, sum skal tryggja, at leiðslan røkkur sínum málum. Ein týðandi liður í grannskoðanini er tí at kanna, um innaneftirlitið virkar. Sambært pkt. 17 í ISA 500 er ein roknskapur rættur og álítandi, um skrásetingarnar lúka hesi krøv/mál (roknskaparmálini):

1. Veruligar hendingar – skrásetingar og hendingar, sum eru bókaðar, eru veruligar og viðvíkja fyritøkuni.

[1] IFAC: International Federation of Accountants – altjóða felagsskapur fyri privat grannskoðaravirki
[2] ISA: International Standards on Auditing, grannskoðanarstandardar, ið IFAC gevur út
[3] ISA 315 "Um at seta seg inn í viðurskiftini hjá einum virki og at meta um vandan fyri týðandi skeivum upplýsingum í roknskapinum"

2. Fullfíggjað skráseting – allar skrásetingar og hendingar, sum eiga at vera skrásettar, eru skrásettar.
3. Neyvleiki – upphæddir og aðrar dátur, sum viðvíkja bókaðum skrásetingum og hendingum, eru rættar.
4. Tíðaravmarkan – skrásetingar og hendingar eru bókaðar í røttum tíðarskeiði.
5. Flokking – skrásetingar og hendingar eru bókaðar á rættar kontur.

Endamálið við grannskoðanini er at kalla ein spegilsmynd av teim málum, sum ein leiðsla skal stremba ímóti, herímillum at roknskapurin er rættur. Tí eru grannskoðanarmálini ein spegilsmynd av roknskaparmálunum.

Er talan um landsroknskapin, skulu tær avgerðir, roknskapurin fyri eina játtan fevnir um, eisini vera samsvarandi:

6. Veittum játtanum.
7. Galdandi lógum og fyriskipanum.
8. Verandi avtalum og vanligum siði.

Grannskoðanin skal eisini ansa eftir, at hóskandi er atborið fíggjarliga (fyrisitingargrannskoðan: sparsemi, produktivitetur og effektivitetur).

## 6.4 Samskifti við leiðsluna um vandan fyri sviki

Skeivleikar kunnu vera í roknskapinum, tí mistøk eru gjørd, og tí at svik er framt. Munurin millum mistøk og svik er, at mistøk eru *"ikki tilætlað"*, men svik er *"tilætlað"*.

Sambært pkt. 2 í ISA 240, grannskoðanarstandardur um "Skylduna hjá grannskoðaranum at umhugsa svik í sambandi við grannskoðan av roknskapum", er talan um tvey sløg av sviki, sum eru viðkomandi fyri leiðsluna og onnur starvsfólk:

- At skeivleikar eru í roknskapinum, vegna stuldur ella misnýtslu av aktivum hjá stovninum
- At skeivleikar eru í roknskapinum, tí falsað er við upplýsingum í roknskapinum

Í talvuni niðanfyri, sum er gjørd við støði í "bilag 1 til ISA 240", verður víst á 3 orsøkir til, at svik verður framt:

| **Orsøk** | **Falsan av roknskaparupplýsingum** | **Stuldur ella misnýtsla av aktivum** |
|---|---|---|
| **Insitament/trýst** | Ov høg (órealistisk) krøv sett til roknskaparliga úrslitið | Vánaligur privatbúskapur |
| **Møguleiki at fremja svik** | Leiðsla og starvsfólk kunnu seta eftirlit til viks | Aktivini er løtt at "umseta" og innaneftirlitið er veikt |
| **Umbering/undanførsla** | Tað fer skjótt at ganga betur | Fái ov lítið í løn |

Vísandi til pkt. 34 í ISA 240 eigur grannskoðarin at umrøða við leiðsluna vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tí svikað hevur verið, herímillum hvussu stóran vanda leiðslan metir vera fyri, at stórvegis skeivleikar kunnu vera í roknskapinum, tí svikað hevur verið, hvørjar mannagongdir leiðslan nýtir at finna fram til vandarnar fyri sviki, hvørji tiltøk eru sett í verk at forða fyri sviki, og hvussu leiðslan samskiftir við starvsfólk um, hvat hon heldur vera sømiligan og rættan atburð.

Vísandi til pkt. 38 í ISA 240 skal grannskoðarin biðja leiðsluna á stovninum um at greiða grannskoðaranum frá, um tey vita um at svik er farið fram, um tey hava havt illgruna um svik, ella um tey hava hoyrt um skuldsetingar um svik.

### 6.5 Fyrisitingargrannskoðan

Í § 4, stk. 3, 2. pkt., er kravið um fyrisitingargrannskoðan orðað soleiðis:

*Harumframt verður ansað eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.*

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu harafturat áleggja roknskapargrannskoðanini at gera frágreiðingar um víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum roknskaparøkjum, og teir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um víðkaða fyrisitingargrannskoðan á øllum roknskaparøkjum.

Orðingin *"hóskandi atborið fíggjarliga"*, er ætlað at svara til orðingina, "varetages på en økonomisk hensigtsmæssig måde", sum er nýtt í "lov nr. 318 af 14 maj 1997 om ændring af lov om kommunernes styrelse", m.a. fyri at knýta hetta grannskoðanarhugtak til eitt frammanundan kent hugtak.

## 7 Frágreiðingar

### 7.1 Frágreiðingar til løgtingsgrannskoðararnar

Sambært grannskoðanarlógini (Ll. nr. 25/1999) skal arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum kunna grunda seg á frágreiðingar frá roknskapargrannskoðanini, t.v.s. Landsgrannskoðanini og privatum grannskoðarum. ***Frágreiðingarnar eru sostatt ein týðandi táttur í eftirliti Løgtingsins við fíggjarviðurskiftum landsins og við fyrisiting landsstýrisins.*** Landsgrannskoðarin, sum er leiðari av Landsgrannskoðanini, er skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, og skal stuðla teimum í arbeiði teirra.

### 7.2 Frágreiðingar til stovnsleiðarar og avvarðandi landsstýrismannin

Sambært § 12 skulu frágreiðingarnar fyrst leggjast fyri landsstýrismannin til viðmerkingar, og í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar skulu verða tiknar við møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til.

Áðrenn ein frágreiðing verður latin landsstýrismanninum, hevur avvarðandi stovnsleiðari vanliga havt høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina, og eftir áheitan skal roknskapargrannskoðanin kunna landsstýrismannin um, í hvønn mun og á hvønn hátt grannskoðað hevur verið. ***Landsstýrismaðurin og stovnsleiðarar kunnu tí í ein ávísan mun nýta frágreiðingar frá roknskapargrannskoðanini sum eftirlitsamboð, m.a. á roknskaparøkinum.***

Niðanfyri er ein mynd av samskiftinum millum Landsgrannskoðanina og omanfyri nevndu myndugleikar.




## 7.3 Frágreiðingar til almenningin

Sambært § 13 kann ein og hvør kunna seg um tær frágreiðingar, sum roknskapargrannskoðanin letur løgtingsgrannskoðarunum, og harvið fær almenningurin eisini innlit í grannskoðanararbeiðið.